## Vil ikki hjálpa Netanyahu

Ísraelski uttanríkisráðharrin, Tzipi Livni, sum eisini er formaður í flokkinum Kadima, sigur, at hon fer ikki at skipa samgongu uttan so, at hon sjálv verður forsætisráðharri. Kadima er størsti flokkur í Ísrael, og Livni hevur boðið Benjamin Netanyahu og flokkinum Likud í samgongu, men við teirri treyt, at hon skal leiða stjórnina. Vil Netanyahu ikki taka av hesum tilboðnum, er Kadima til reiðar at fara í andstøðu, sigur Tzipi Livni.



## Meiri útlát enn væntað

Ein av teimum fremstu veðurlagsgranskarunum hjá ST ávarar nú um, at tað gongur uppaftur verri við tí veksandi hitanum á jørðini enn væntað. Chris Field, sum er professari á Stanford University, sigur við AP, at nýggjar mátingar vísa, at útlátið av $CO_2$ vaks 3,5 prosent um árið í árunum frá 2000 til 2007. Lísfrøðingurin vísir á, at í 1990-árunum vaks útlátið 0,9 prosent um árið. Orsøkin til tann stóra vøksturin er sambært Chris Field, at Kina og India brúka altsamt meiri kol til orkuframleiðslu.

# Rúsan í Miðvági byggir út

**- Hølini hava verið ov trong frá fyrsta degi av, og nú verður so bygt upp í, so handilin fær munandi betri umstøður, sigur Allan Nielsen, leiðari í Rúsuni í Miðvági**

ÚTBYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av deildunum hjá Rúsuni, sum heilt frá byrjan av hevur virkað undir ógvuliga trongum umstøðum, er deildin í Miðvági. Tað hjálpti heldur ikki um plássið, tá handilin broyttist til at gerast ein sjálvtøkuhandil, men nú verður so bøtt um hatta.

Tað er arbeiðarafelagið í Vágum, sum saman við arbeiðsgevarunum eiga húsini, har Rúsan heldur til, og nú hava feløgini so gjørt av at byggja upp í, so hølisviðurskiftini hjá Rúsuni verða munandi betri. Arbeiðarafeløgini eiga 80% av bygninginum, meðan arbeiðsgevararnir eiga seinstu 20%.

- Ætlanin er, at uppíbygningurin skal gerast goymsla, meðan allur verandi bygningur skal fevna um sjálv handilshølini. Hetta fer at geva okkum munandi meiri pláss í sjálvum handlinum, og umstøðurnar sum heild gerast nógv betri, sigur Allan Nielsen, leiðari í Rúsuni í Miðvági.

Seinni er so ætlanin at byggja ein lílan bygning niðan úr norðara enda soleiðis, at bygningurin verður symetriskur.

- Soleiðis, sum tíðarætlanin sær út, verður bygningurin innilokaður í mars, og tá skuldi verið mest sum klárt at tikið hann í nýtslu hjá okkum, sigur Allan Nielsen.

Umframt leiðaran er eitt fólk aftrat knýtt at Rúsuni í Miðvðagi, tó bert til 60% tíð.




*Handilin verður munandi rúmligari og umstøðurnar í heila tikið nógv betri, tá uppíbyggingin er liðug í næsta mánaði, sigur Allan Nielsen, leiðari í Rúsuni í Miðvági*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Føroyar sleppa hvørki upp í Es ella upp í Efta

**Eitt løgfrøðiligt upprit, sum verður lagt fram í hesi vikuni, staðfestir, at so leingi vit eru partur í danska ríkinum, sleppa Føroyar hvørki at fáa limaskap í Efta, ella í ES**

EVROPAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyar sleppa hvørki at verða limur í Es ella í EFTA.

Tað staðfestir ein danskur løgfrøðingur í einum uppritið, sum nú verður almannakunngjørt.

Tað er Norðuratlantsbólkurin, sum hevur biðið løgfrøðingin, Ole Spierman, kanna føroyskan limaskap í ES og í EFTA.

Ole Spieman er serfrøðingur í fólkarætti og altjóða rætti. Og ein spurningur, hann skuldi kanna fyri Norðuratlantsbólkim, var, hvørjar løgfrøðiligar møguleikar føroyingar hava fyri at gerast limir í ES ella EFTA.

Uppritið frá løgfrøðinginum verður lagt fram seinni í hesi vikuni.

Men í Løgtinginum Høgni Hoydal avdúkar kortini longu nú, at høvuðsniðurstøðan hjá løgfrøðinginum er, at sum okkara ríkisrættarliga støða er nú, kunnu Føroyar hvørki gerast limir í ES ella í EFTA.

Tað merkir, at skulu vit lima okkum inn í annan av hesum felagsskapin, verður tað ígjøgnum Danmark.

- Tað verður Danmark, sum verður limur vegna Føroyar, staðfestir Høgni Hoydal frá løgfrøðinginum.

So leingi vit eru partur í danska ríkinum, skulu vit sleppa øllum hugsanum um at verða limur í ES ella í EFTA, vísir eitt løgfrøðiligt upprit, sum verður almannakunngjørt í næstu viku.

Norðuratlantsbólkurin hevur sett ein danskan løgfrøðing at kanna fyrimunir og vansar við grønlendskum og føroyskum ES- og EFTA-limaskapi.

Kanningin skal millum annað staðfesta, um tað ber til at fáa sjálvstøðugan føroyskan og grønlendskan ES-limaskap umvegis Danmark.

Tað eru tey bæði fólkatingsumboðini, Høgni Hoydal úr Tjóðveldi, og Julianne Henningsen úr grønlendska flokkinum IA, sum hava tikið stig til kanningina.

Løgfrøðingurin, Ole Spiermann, er liðugur við kanningina, men úrslitið verður ikki lagt fram fyrr enn seinni í mánaðinum.

Landsstýrissamgongan hevur annars sett sær sum mál at kanna møguleikarnar fyri tættari tilknýti til ES.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, sigur at nevndin, sum skal kanna málið, er ikki sett enn.

Í løtuni kannar EFTA, um felagsskapurin kann víðkast til eisini at fevna um Føroyar.

Norðuratlantsbólkurin hevur biðið ein løgfrøðing kanna fyrimunir og vansar við føroyskum og grønlendskum limaskapi í ES

Tað er løgfrøðingurin Ole Splermann, sum skal gera kanningina fyri Norðuratlantsbólkin, skrivar grønlendska blaðið AG.

Juliane Henningsen, fólkatingskvinna hjá IA, sigur við blaðið, at løgfrøðingurin skal kanna tey veruligu viðurskiftini, so tað ber til at fáa eitt breitt orðaskifti um møguleikarnar við ES-limaskapi.

Ole Spiermann hevur longu latið Norðuratlantsbólkinum eitt notat, men Juliane Henningsen vil ikki siga, hvat stendur í tí. Tað verður almannakunngjørt í Føroyum og Grønlandi samstundis - hest eina ferð í vár, sigur hon.